**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*SERSTOVNADEILDIN*

# Pedagogur

## til Sambýlið undir Gráasteini

Undir Almanna- og heilsumálaráðnum og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Sambýlinum undir Gráasteini, er 1 pedagogstarv leyst at søkja frá 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Í Sambýlinum búgva 5 búfólk við autismu.

Arbeiðið fevnur millum annað um at vegleiða búfólkið í øllum tí sum tey hava tørv á. At menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi. At skapa trivnað og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkinum menningarmøguleikar og saman við teimum finna útav, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Dentur verður lagdur á, at tann ið sett/ur verður, hevur evni og vilja at samstarva og samskifta við okkara avvarðandi og starvsfelagar, er sjálvstøðug/ur, likamliga og sálarliga væl fyri, fleksibul, kreativ/ur, dámar væl avbjóðingar, ágrýtin og er opin fyri nýhugsan.

**Løn- og setanartreytir:**
Starvið eru tænastumannastarv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og lønt stigini 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið í Pætursgøtu 3, ið er undir somu leiðslu sum Sambýlið undir Gráasteini, tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Nærri fæst at vita um størvini frá Onnu Johannesen, leiðara á tlf. 215540

Um eingir pedagogar søkja størvini, verða størvini sett við hjálparfólkum sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Sambýlið undir Gráasteini**
Att: Leiðarin
Undir Gráasteini 4
100 Tórshavn

Umsóknarfreist 16. februar 2006 kl. 12.00

**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*SERSTOVNADEILDIN*

# Pedagogar

## til Sambýlið í Pætursgøtu

Undir Almanna- og heilsumálaráðnum og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Sambýlinum í Pætursgøtu, eru tvey pedagogstørv leys at søkja frá 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstørv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Arbeiðið fevnur millum annað um at vegleiða búfólkið í øllum tí sum tey hava tørv á,
At menna hvønn einstakan til at húsast saman í felagsskapi.
At skapa trivnað og á ein pedagogiskan hátt tryggja búfólkinum menningarmøguleikar og saman við teimum finna útav, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Dentur verður lagdur á, at tann ið sett/ur verður, hevur evni og vilja at samstarva og samskifta við okkara avvarðandi og starvsfelagar, er sjálvstøðug/ur, likamlig og sálarliga væl fyri, fleksibul, kreativ/ur, dámar væl avbjóðingar, ágrýtin og er opin fyri nýhugsan.

**Løn- og setunartreytir:**
Størvini eru tænastumannastørv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og lønt stigini 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Starvsøkið umfatar eisini Sambýlið undir Gráasteini 4, ið er undir somu leiðslu sum Sambýlið í Pætursgøtu, tí kann tann setti eisini rokna við at fáa aðrar uppgávur, um tørvur gerst á hesum.

Nærri fæst at vita um størvini frá Onnu Johannesen, leiðara á tlf. 215540.

Um eingir pedagogar søkja størvini, verða størvini sett við hjálparfólkum sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Sambýlið í Pætursgøtu**
Att: Leiðarin
Pætursgøta 3
188 Hoyvík

Umsóknarfreist 16. februar 2006 kl. 12.00.

**Søkt verður eftir**

# LÆRLINGI Í HAVN

***at byrja sum skjótast***

**Læran umfatar:**
Samskifti við viðskiftafólk, sølu og annað fyrifallandi handilsarbeiði.

**Vit vænta:**
at tú ert sjálvstøðug/ur, arbeiðssom/samur, røkin, fyrikomandi og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. februar 2006.

*Sendast til:*

**P/F Hjá Fróða**

Yviri vi Strond 3 · Postboks 1336 · FO-110 Tórshavn
tel 31 08 08 · fax 31 46 76 · frode@post.olivant.fo · www.hjafroda.fo

Sosialurin

# Leyst festi

Festið, matr. nr. 1a, Leyna bygd, 6 merkur - í haganum Leynahaga, Framman fyri Húsini (einbýttur hagi, matr. nr. 80) er leyst at søkja.

Umsóknarfreistin er 1. mars 2006.
Umsóknarbløð fáast á Búnaðarstovuni tlf. 47 90 00 ella á heimasíðu okkara.

Saman við umsóknini skulu vera hjálagdar váttanir um royndir og útbúgving frá landbúnaðarskúla.

Tá umsóknarfreistin er úti, verða umsóknirnar viðgjørdar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 17. mai 2004 um landsjørð og kunngerð nr. 98 frá 22. desember 2004 um festi.

Kollafjørður, tann 4. februar 2006

**BÚNAÐARSTOVAN**

Búnaðardepilin · Frammi í Dali 166 · 410 Kollafjørður
Tlf. 479000 · Fax 479020 · bst@bst.fo · www.bst.fo

# Til leigu/sølu

Í nýggja handils- og skrivstovubygningi okkara eru hølir til leigu/sølu.

Talan er um eitt høli á 1. hædd tilsamans uml. 100 $m^2$

Hølini sum eru klár til innflytan eru vælegnað til skrivstovu ella annað lættari virksemið og hava atgongd frá Gulasteinsvegi og Heiðavegi.

Í kjallarahæddini er talan um eitt høli uml. 215 $m^2$ við atgongd frá Gulasteinsvegi. Hølini sum eru vælegnað til goymslu ella annað virksemið, verða klár til innflytan 1. januar 2006.

Í bygninginum eru frammanundan Formula Føroyar, Grannskoðarastovan og Kiosk Vár.

Um hóskandi boð fæst kann eisini verða talan um sølu.

**Spf. Vársól**
**Heiðavegur 31**
**600 Saltangará**
**Tlf. 748392**
**varsol.s@kallnet.fo**